## Bók um friðleysan smádrong




Bókadeildin gevur nú út fjóðru bókina í røðini Krýnikur úr døkkari fortíð. Tað er bókin Útskot, sum er um dreingin Torak, sum einsamallur skal læra at lívbjarga sær í skóginum. Hann er foreldraleysur og eigur ongan góðan, men so kemur hann fram á ein úlvsunga, og síðan verður hann tikin inn í ein av ættbólkunum í skóginum. Í Útskoti er hann aftur einsamallur og flýggjar undan fólki, tí hann er dømdur at vera útskot. Øll hava rætt at taka hann av lívi, tí hann er vorðin yvirtikin av sálarátara, sum ger, at hann ikki kann vera saman við hinum. Hóast søgan kann minna um eina fantasysøgu, so gevur hon stórt innlit í fólkalív og náttúru, umframt at hon er sera spennandi og óhugnalig. Bókin er ætlað børnum frá 10 ára aldri. Bergur Rasmussen hevur týtt.

## Nóa og stóri báturin




Heimamissiónsforlagið gevur í hesum døgum barnabókina Nóa og stóri báturin. Bókin er ætla børnum í 4 til 6 ára aldri. Blaðsíðurnar eru magnetiskar, og við fylgja 20 figurar sum kunnu setast á síðurnar. Sera vøkru myndirnar hevur Helen Prole teknað, og Tim Dowley hevur skrivað tekstin. Týtt bókina til føroyskt hevur Jóngerð Mikkelsen. Bókin kostar kr. 135,00 og kann keypast frá Heimamissiónsforlagnum tlf. 470000 á heimasíðuni www.hmf.fo og í bókhandlunum runt um í landinum.

# Listarlig ferð við Rannvá H. Mortensen




*Nýggja bókin um listina hjá Rannvá Holm Mortensen gevur eitt forvitnisligt yvirlit yvir eitt av okkara mest víðfevndu listafólkum*

**Nýggj listabók og serframsýning í Listaskálanum tekur áskoðaran við á eina ferð í listini hjá Rannvá Holm Mortensen**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fríggjadagin letur ipp serframsýning á Listasavni Føroya við akrýlmálningum, grafikki og kollasjum hjá listakvinnuni Rannvá Holm Mortensen. Framsýningin er afturlítandi og vísir á nøkur av verkunum, sum listakvinnan fyrr hevur gjørt, umframt samtíðarlig og løtubær vísandi heilt nýggj verk.

### Spælandi lættleiki

Í sambandi við framsýningina hevur Malan Marnersdóttir, professari, dr.phil., skrivað bók um listina hjá Ránnvá Holm Mortensen. Í bókini verður millum annað sagt um listakvinnuna, at "hon er impulsiv og spontan í verumáta, hon er bráð og sjálvkravd í arbeiðshátti, harafturat er hon full av hugskotum, sum ofta bera dám av tí káta og lystiliga eins væl og av tí listaliga. Rannvá fer púra uttan fyrivarni í holt við verkini. Skitsurnar hava dám av spælandi lættleika, sum í stóru verkunum er tamdur nakað, hóast tað spælandi næstan ongantíð er fyribeint".

Verkini hjá henni, summi ristastór kollasjuverk við upp til 15 myndum, røkka frá ekspressiónismu um postmodernismu til samtíðarlist, sum beinleiðis tekur inn og bendir á týðandi samfelagslig, náttúru- og tøknifrøðilig viðurskifti.

Rannvá er fødd á Tvøroyri í 1950. Hon hevur verið virkin listakvinna síðan 1997, men hon hevur teknað og gjørt myndir av øllum handa slag, síðan hon var smágenta. Hon hevur gingið á listaskúla og tikið listaskeið bæði í Føroyum, Danmark og Grikkalandi og gjørt listaligar námsferðir til París og London. Rannvá hevur sýnt verk síni fram m.a. í Norðurlondum, Spania og Bulgaria, og verkini eru eisini væl umboðað í almennum stovnum í Havn.

**FAKTA**

Serframsýningin hjá Rannvá Holm Mortensen á Listasavni Føroya letur upp fríggjdagin 7. november klokkan 17.00. Malan Marnersdóttir setir framsýningina og fernisering verður frá klokkan 17 til 19. Sámal Ravnsfjall stendur fyri tónleikinum, listakvinnan verður hjástødd og bjóðað verður við onkrum leskiligum.
Framsýningin endar sunnudagin 14. desembur 2008.

## Tilboð um listabústað

**Listafólk úr Havn kunnu nú fáa ókeypis arbeiðsnáir eitt avmarkað tíðarskeið í Villa Bergshyddan í Stockholm**

Høvundar, sjónleikarar, journalistar og onnur fólk úr Havn, sum í breiðari merking fáast við mentan fáa nú høvi at gista eina til tvær vikur á listabústaðinum Villa Bergshyddan í Stockholm.

Tíðarskeiðið, gistast kann, er frá apríl til og við september. Pláss er fyri tveimum vaksnum og tveimum børnum.

Tilboðið er komið í lag á norðurlendskum høvuðsstaðarfundi í Oslo, har leiðarin á mentamáladeildini, Jákup Simonsen, umboðaði Tórshavnar kommunu.

Nærri upplýsingar um gisting á Villa Bergshyddan fáast við at venda sær til:
*Stockholms kulturförvaltning*
*Nordiskt kultursamarbete*
*Yvonne Boulogner*
*Box 16113*
*SE 103 22 Stockholm*
*Telefon +46 8 508 31940*
*yvonne.boulogner@kultur.stockholm.se*

Søkjast skal til adressuna innan 1. februar 2009.

**-ave**

# Bindikafé í Klaksvík

Hóskvøldið 06. november kl. 20 skipar Norðoya Kunningarstova fyri stórari bindikafé á Hotel Klaksvík. Hetta verður eitt satt hugnakvøld fyri allar kvinnur, og ongin treyt er at hava stokkar við.

Síðan móti er komin í tað bundna plaggið, er rættilig ferð komin í stokkarnar og tógvhandlarnir standa seg ikki við at fylla hyllarnar við føroyskum og útlendskum tógvi.

Kvøldið verður hugnaligt, sum í bindiklubbum, so góð tíð er at hugna sær við borðini.

Eisini verða ymisk kreativ og áhugaverd íkast á skránni.

Sum tað sømir seg einum røttum bindiklubba, verður kaffi/te og stórt kaku- og dessertborð, sum Hotel Klaksvík borðreiður.

Eisini fara tógvhandlarnir "Búnin" og "Hjá Vimu" at vísa ymiskt úrvæl av tógvi og uppskriftum

Meir fæst at vita á Norðoya Kunningarstovu, tlf. 45 69 39

**-ave**



*Tógv og tógvprát fer at seta dám á bindikafeina í Klaksvík hóskvøldið*